

*Eikilund varð fyri ein dag slept, soleiðis at børni ístaðin fingu aðrar upplivingar enn júst tær, sum finnast inni á stovninum*



# Sangirnir:

Lag: Vit fáa tevatn og breyð

**1.**
Ja, víkingar vit eru, og hava onga neyð
Vit hava alt vit ynskja, ja bæði mjólk og breyð

Niðurlag:
***Vit fáa egg og tomat***
***Og elska frukt og salat***
***Vit fara nú í víking, og eta nógv spinat***

**2.**Vit ganga og vit sigla, og goyma okkum væl
So hann vit ikki kenna, ei síggja okkum skal

N:
***Vit fáa......***

**3.** Vit eiga svørð og brandar, og alt ið hoyrir til
Men tá ið omman gandar, tá er eitt verri skil

N:
***Vit fáa....***

**4.** Vit eru nokkso villir, tað kundi tú nokk gitt
Men tó vit gerast illir, so eru vit so fitt

**Lag: Hon er omma mín (Kular røtur)**
Niðurlag: ***Vit eru víkingar, vit eru víkingar***
***Vit eru víkingar, vit eru víkingar***

Tykkum skal eg vísa, hygg mítt stóra svørð
Øll meg sikkurt ræðast, skinkla bein og lør
Víkingur eg eri, bangin eru øll
Mamma sigur sjálv, eg eri ljótur sum eitt trøll

Niðurlag: ***Vit eru víkingar.....***

Gangi eg við hjálmi, við stórum hornum í
Eri nokkso villur, ongin fer forbí
Men eg haldi næstan, at eg lovi tær
Tí tú er so fittur, og eg veit tú líkist mær

Niðurlag: ***Vit eru víkingar......***





*Tað var ein heldur óvanlig sjón, sum tey í Vági sóu fríggjadagin, tá víkingarnir gingu gjøgnum bygdina*